# BØNARLØTAN

**MAI** **2025** **40. árg.**

## *1. Hósdagur* — *Sálm. 45*



### GRØNLAND, Nuuk
### Naalakkap Jiisusip Oqaluffa
### Hans Sivertsen

Ísur og kavi fóru illa við brúgv og kai í Naalersitaq. Thorvald Gaardlykke, tel. 519191, verður á legunum 6.-21. juni at stoypa byrging til vatnturbinuna og bøta um rørini. Um nóg nógv koma, kann brotna kaiin eisini umvælast. Tørvur er á gentuleiðarum til barnavikurnar 7.-18. juli. Tær mugu koma uml. 4. juli og fara uml. 21 juli. Okkum tørvar eisini skipara til Immanuel 26. mai - 15. juni og 28. juli - 18. aug.

**KRINGVARPIÐ**

18. og 25. mai.... sjónvarpsandakt, Ruth Gaardlykke
25. mai ............... sjónvarpsmøti, Ebenezer, Tórshavn
1. juni ................. útvarpsmøti, Hebron, Argir

**EVANGELISKA RØDDIN á ras2.fo (meir á www.evr.fo)**

Sunnukv...........kl. 21 Kelduvaðið (endursent hóskv. kl. 21)
Týskv..............kl. 21 Á torginum (endursent sunnud. kl. 12.30)

## *2. Fríggjadagur* *4. Mós. 32.23-42*



**FRANKARÍKI, Nantes, OM**
**Cecile og Jóhannis Mortensen**
**Sarah 14, Leah 11, Abigail 6**

Um 130 fólk luttaka á árliga samkomuvikuskiftinum fyrst í mai. Cecile og aðrar kvinnur í samkomuni standa fyri. Evnið er *Engagement to God*. Biðið fyri talarunum, og at samkoman fær ávøkst. Jóhannis og samkomuleiðarin í høvuðssamkomuni hava stovnað eitt toymi at leita eftir nýggjum bygningi í Nantes, tí verandi er ov lítil. Toymið leitar eisini eftir bygningi í Orvault til nýstovnaðu samkomuna har. Báðar samkomurnar vaksa skjótt. Biðið, at vit finna røttu bygningarnar.

**VENESUELA, Puerto Ordaz**
**Nurimar og**
**Jóhannus Frants Poulsen**



Nuri fær stráluviðgerð í skjaldkertlinum seint í apríl-mai. Biðið fyri henni. Vit fyrireika trúboðarastevnu í samkomuni her 2.-4. mai. Enn er eingin farin út í trúboðaraarbeiði hiðani frá.

## *3. Leygardagur* *Jóh. 14.1-17*



**SENEGAL, Dakar**
**Marion og Hans Arni Jensen**
**Ryan 16**

Vit gleðast um, at í longri tíð hevur verið nógv kaldari í Dakar enn vanligt. 3.-11. mai fara Marion og ein onnur kona til Guinea at hjálpa nøkrum, sum læra seg eitt ættarbólkamál og teirra mentan. Biðið fyri ferðini, og at alt eydnast væl. Eftir meira enn 30 ár á skrivstovuni í Dakar gevst skrivstovumaður okkara næsta ár fyri aldur. Vit royna at finna annað fólk úr Senegal, ið kann taka yvir. Nevndarfundur í Dakar Academy verður 21.-22. mai. Marion er í nevndini, og Ryan gongur á skúlanum, sum er serliga fyri trúboðarabørn. Biðið, at fundirnir eydnast, og rættar avgerðir verða tiknar. Vit sakna tænastuna í Guinea, men eru takksom fyri, at vit kunnu vera stuðul á ein meiri praktiskan hátt her í Senegal. Biðið, at vit gera tað við gleði.

**DANMARK, Hirtshals, Malta**
**Ansa og Arnold Mortensen**
**Ewelina 15**
**Anna og Hans Djurhuus**

Føroyskt møti verður leygard. 3. mai kl. 19 í Bethaniakirkjuni, Dag Hammarskjøldsgade 2a í Aalborg. Biðið, at Harrin signar møtið.

## *4. Sunnudagur* *4. Mós. 33.1-24*

**ONGLAND, Personal Support Matters**
**Claire og Craig Niclasen**
**Rebekah 17, Lydia 15**

22 luttakarar eru á undirvísingarskeiðnum, ið er fram til 10. juni. Biðið, at eg, Claire, framhaldandi fái styrki at tæna Gudi, takksom í øllum umstøðum.



**ONGLAND, Cornwall**
**Anna og David Rodda**

**FØROYAR**
**– Else og Poul Johan Djurhuus**
**– Anna Maria og Rógvi Joensen**
**– Khuldah og Sámal Mikkelsen, Ester 14, Samuel 10**
**– Dora og Niels Pauli Nónstein, Kristina 14**
**– Danjal og Synnøve av Rana, Anna Emilie 10, Lukas 4**

*Í dag fyllir Noah Flanagan 16 ár

## *5. Mánadagur* — *Jóh. 14.18-31*



**ÍSLAND, Reykjavík, Akurinn**
**Rósa og Jógvan Purkhús**
**Akureyri, Sjónarhæð, Ástjørn**
Biðið, at nóg nógv børn, unglingar og starvsfólk koma á legurnar. Tað er ikki lætt at fáa trúgvandi starvsfólk. Kristiligt arbeiði møtir mótgongd. Biðið, at Harrin signar og sendir alt, sum tørvar.

## *6. Týsdagur* — *4. Mós. 33.25-56*

**OM, LOGOS HOPE, TeenStreet**
Fram til síðst í mai eru 13 mans úr Klaksvík, Leirvík og Fuglafirði umborð á Logos Hope at umvæla tveir ljósmotorar og

gera annað arbeiði. Teir eru 9 ungir smiðir og lærlingar saman við 4 maskinmonnum: David á Marknagili, Ari Jógvansson, Kári Lindberg, Hóri Skaale, Hans Elttör, Heini Næs, Jákup Øregaard, Ronni Joensen, Dánjal Klæmintsson, Pól og Petur Kristian Johannesen, Jóannes Næs og Esmar Müller. Harumframt fara Hjalmar og Torleif Andreassen av Eiði at sýna kranar og gera annað arbeiði umborð.




**MEKSIKO, Michoacán, Puruandiro**
**Hansy og Martin Tuohy**
**Emma Grace 17, Jónatan 15, Markus 13, Evita 10, Joy 8**
Vit eru í Føroyum fram til juli.

*Í dag fyllir Evelyn Poulsen 5 ár

## *7. Mikudagur* *Jóh. 15.1-27*

**PAPUA NÝGUINEA, Sorimi (fjararb.)**
**Carol og Poul Joensen**
Vit vitja í Sorimi fram til 18. mai. Biðið um uppbyggjandi løtur saman við samkomuni, góða heilsu, og at ferðin gongur væl. Afturkomin til Onglands skal eg undirvísa úr 2. Pæt. á NTM-skúlanum.

**FØROYAR**
**– Elin og Jógvan Jacobsen**
**– Unn og Jógvan Zachariassen**
**– Lis Zachariassen**
**– Annika og Poul Færø**
**– Anna og Óli Steinberg**
**– Maria og Jens Bech**
**– Atlantic Mission**



## *8. Hósdagur* *Sálm. 46*



**FØROYAR**
**Shamila og Høgni Johannesen**
Biðið fyri møtum kring landið, samtalum, uppfylging og arbeiðnum á netinum. Biðið eisini fyri Sáru, systur Shamilu, sum er virkin har norðuri í Pakistan, bæði í høvuðstrúarbólkinum og millum kristin. Í mai fara vit undir fleiri beinleiðis netframløgur, sum Sára leggur til rættis fyri samkomuleiðarar í Norðurpakistan.

*Í dag fyllir Terji í Prestgarði 13 ár

## *9. Fríggjadagur* *4. Mós. 34.1-29*



**USA, New Tribes Mission, Alabama**
**Judy og Óli á Grømma Jacobsen**
9.-15. mai fáa NTM-umboð fyri londini í Evropa vitjan av altjóða NTM-leiðsluni. Eg skal tala, og Judy verður helst skrivari á fundunum. 16.-25. mai vitja vit familju hjá Judy í Týsklandi. Flestu teirra duga ikki enskt, men Judy dugir týskt. Eg skal tala í eini samkomu har. 26.-31. mai eru vit í Danmark og heilsa upp á systkini hjá mær. 1. juni fara vit til USA.

## *10. Leygardagur* *Jóh. 16.1-15*

**FØROYAR**
**Vanja og Svein í Prestgarði, Terji 13, Petra 11**
Evangelisk tiltøk: 10. mai í Salt á Tvøroyri, 16.-18. mai í Lívdini, 21.-31. mai tjaldmøtir í Sarons Dal, Noregi. Vit innspæla nú tónleik,

sum skal gevast út í Noregi og Føroyum. Okkum tørvar bønir tykkara, so evangeliið kann náa mong til frelsu, endurnýggjan og hjálp. Gjøgnum summarið virka vit í Føroyum, Danmark, Noregi og Svøríki.

**DANMARK, Odense**
**Árni Helmsdal**

Vit arbeiða við at gera ein telefonlista, so vit kunnu ringja runt eitt sindur áðrenn hvørt møti.



**NTM – FØROYAR**
**Noomi og Eli Christiansen**
**Hadassa 14, Tabita 11, Debora 9, Natan 6**

## *11. Sunnudagur* — *4. Mós. 35.1-15*

**DANMARK**
**Glostrup Frikirke**

Biðið fyri børnunum og teim ungu, sum samlast í Glostrup Frikirke, at tey verða upplærd í Skriftini og eggjað til at halda seg nær til Harran. Nøkur av børnunum, sum koma, duga lítið og einki danskt enn. Vit vóna, at tey kortini fáa gott av felagsskapinum í samkomuni.

## *12. Mánadagur* — *Jóh. 16.16-33*

**OM, SUÐURAFRIKA, Mamelodi Aids Hope**
**Tanja og Kurt Abrahams**
**Hanna 1**

Í dag fara vit tvær vikur á outreach. Biðið, at Harrin varðveitir, gevur vísdóm og virkar millum luttakararnar, so at menniskju verða frelst. Kurt hevur fingið visum til Føroya, men vit biðja enn eftir, at mítt visum kemur til tíðina, so vit kunnu koma heim í juni.

## 13. Týsdagur — *4. Mós. 35.16-34*

**DANMARK, Kolding**
**Anne og Jan Zachariassen**
Eg komi til Føroya hálvan mai at byrja arbeiðið við *TeknBíbliuni*. Jens Pauli kemur nakað seinni. Vit hava arbeiðshøli í Fuglafirði – minnist hetta virksemið. Vit eru Harranum takksom fyri, at trý deyv hava biðið um dóp. Biðið, at Anne finnur eitt starv við skiftandi arbeiðstíðum.

## 14. Mikudagur — *Jóh. 17.1-26*

**GRØNLAND, Qasigiannguit (fjararb.)**
**Solveig og Daniel Kinda**
Hope, dóttir pastor Fred í Uganda, og ein starvsfelagi vórðu ógvisliga álopin í apríl. Starvsfelagin doyði, men dóttirin yvirlivdi. Biðið, at Gud grøðir.

## 15. Hósdagur — *Sálm. 47*



**DANMARK, Kristnastova**
**Ásla og Bárður Norðberg**
**Andrea 4, Boas 2**

**Susan og Øssur Berghamar**
Fleiri av eldru útisetunum, sum vit hava havt samband við, stríðast heilsuliga og síggjast sjáldan ella ongantíð á møtum longur. Biðið eftir, at Harrin skal vera teimum nær við friði og nærveru síni, og at tey ikki kenna seg gloymd.
berghamar@kristnastova.dk

**DANMARK, Skovlunde**
**Sara og Andrew Berghamar**
**Lydia 8**




Sunnumorgnar tala vit út frá 5. Mós. Samkomulega verður í Norðursælandi 16.-18. mai. Biðið, at Gud signar vikuskiftið og knýtir samkomuna tættari saman.

## *16. Dýri biðidagur* — *4. Mós. 36.1-13*

**MEKSIKO, Mixtec, Oaxaca**
**Inga McKendry**

Takkið Gudi fyri hjálp Hansara við umsetingini. Fólk skilja nú málberingina, vit nýta fyri rættvísgering. Biðið, at Gud gevur okkum vísdóm, sum vit fyrireika Rómbr. at verða kannað av ráðgeva.



**FØROYAR – ZAREPTA**

Várlega fyri fólk við breki 16.-18. mai. Familjulegur fram til 20. juni. Tørvur er á hjálparfólki á øllum legum.

**– Birgit og Svenning av Lofti**
**– Rutt og John í Skemmuni**
**– Anna og Símun Pætur á Torkilsheyggi**
**– Birita og Petur á Roykheyggi**

## *17. Leygardagur* — *Jóh. 18.1-23*

**ITALIA, Molise**
**Heidi og Regin Guttesen**
**Trisha 13, Emma 8**

Vit takka Gudi fyri, at øll fígging til bygningin í Campobasso er fingin til vega. Vit taka hetta sum enn eitt tekin um, at tað er Kristus, sum áhaldandi byggir samkomu Sína!

**ÍRLAND, Global Serve International**
**Guðrun og Ivor Tutty**

## *18. Sunnudagur* — *3. Mós. 15.1-15*



**USA, North Carolina**
**Charlotte, Calvary Church**
**Gudny og John Munro**
Í dag fáa vit vitjan av føroyskum ferðaliði saman við Eyðuni Jacobsen. Minnist tey, sum tey ferðast.

## *19. Mánadagur* — *Jóh. 18. 24-40*

**TURKALAND, Istanbul**
**Annika og Stephen Everett (fjararb.)**
Líkt er til, at færri trúboðarar nú verða útihýstir úr Turkalandi, og at tað eru fleiri, sum fáa uppihaldsloyvini endurnýggjað ½ til 1 ár. Minnist framvegis samkomuna í Turkalandi og arbeiðið hjá bíbliubrævskeiðnum og okkum, nú vit fyrireika ung úr Onglandi at fara út á missiónsmarkina.

## *20. Týsdagur* — *Áp. 1.1-26*

**PAPUA NÝGUINEA, Kovol**
**Natalie og Philip Hansen**
**Louis 7, Timon 5, Manuel 1, Salome 1**
Stous-familjan, samstarvsfelagar okkara, tæna ikki longur her. Kovolfólk halda seg vera orsøkina til, at familjan fór úr Ethnos360,

men tað er ikki rætt. Vit fara tí til tær seks stóru kovol-bygdirnar at siga teimum, at tey einki skeivt hava gjørt, so eingin misskiljing verður.

## *21. Mikudagur* — *3. Mós. 15.16-33*



**GRØNLAND**
**Juvel II**
**Gull-Britt og Karsten Hansen**
Vit sigla til Grønlands í dag. Biðið, at Harrin signar ferð og manning á øllum túrinum, og at ljósið frá evangeliinum skal lýsa bjart og nema hjørtuni á teimum, ið vit hitta á leiðini. Enn manglar nakað av manning, serliga maskinfólk og tónleikarar. Arbeitt verður við at gera Juvel II kláran til summarið, so at hann lýkur øll myndugleikakrøv. Higartil hevur Harrin hjálpt!

*Í dag fyllir Rio Mortensen 6 ár

## *22. Hósdagur* — *Áp. 2.1-21*

**ONGLAND, European Christian Mission**
**Dorit og Simon Marshall**
Stevnan í Spania fyri ECM-trúboðarar eydnaðist væl. Harrin leiddi og signaði. Ein gestur á gistingarhúsinum, ið einki tilknýti hevði til ECM, kom í prát við ein av trúboðarunum. Tað endaði við, at hann kom til trúgv. Prísaður veri Harrin.

**TÝSKLAND, Hückeswagen, Ethnos 360**
**Wina og Benjamin Hansen**
**Noah Elias 13**

*Í dag fyllir Judah Flanagan 10 ár

## 23. Fríggjadagur Áp. 2.22-47



**PAPUA NÝGUNEA**
**Lili og Brian Poulsen**
**Elliot 8, Jude 6, Evelyn 5, Olivia 1**
Sum foreldur vilja vit ala børn okkara upp í gudsótta og vera teimum góðir vegleiðarar. Biðið fyri samkomuleiðarum her á staðnum, at teir skulu vera Gudi og orði Hansara trúgvir, og at teir fáa vísdóm at leiða og ala upp lærisveinar í samkomum sínum. Gud leggur alsamt fleiri til samkomuna her í PNG. Troyttist ikki at biðja fyri brøðrum og systrum tykkara her.

**FILIPSOYGGJAR, Puerto Prinsessa**
**Cathy og Jógvan J. Rasmussen**
Biðið fyri nýggja ættarliðnum, sum heldur fram við arbeiðnum millum molbogfólkið.

*Í dag fyllir Nya Flanagan 17 ár
*Í dag fyllir Hanna Sharp 17 ár

## 24. Leygardagur 3. Mós. 16.1-16



**PAPUA NÝGUINEA, Mengen**
**Annika og Simon Flanagan**
**Nya 17, Noah 16, Karis 11, Judah 10, Ethan 6**
Vit fara á ráðstevnu í landsparti okkara at hitta mengensamkomuna við lærutilfari um Korintbr. og at eggja bíbliulærarar. Í juni flyta vit av hálendinum til oyggjarnar at búgva saman við mengensamkomuni. Tað er sum at flyta til ein

annan landspart. Í PNG er kostnaður og flutningur ein avbjóðing. Eldru børnini eru á kostskúla. Biðið fyri okkum øllum. Vit vóna at lata okkara frumskógarflogvøllin upp.

## *25. Sunnudagur* *Áp. 3.1-26*

**SENEGAL, Tongia**
**Lív Poulsen**

Eftirkanningin av Dóm. og restini av 2. Sám. gekk væl. Vit eru takksom fyri, at ungi málhjálparin kom aftur úr Dakar í tøkum tíma og kundi hjálpa okkum. Nú skal alt dagførast og gerast klárt til at prenta. Biðið, at málhjálparin kemur til trúgv. NT er nærum liðugt dagført. Okkurt lyklaorð er enn at fáa upp á pláss. Biðið, at Harrin gevur vísdóm til hetta. 17 mán. gamla dóttir unga bíbliuumsetaran hevur havt tríggjar tilburðir av krampa. Biðið, at tey fáa røttu læknaligu hjálpina.

## *26. Mánadagur* *3. Mós. 16.17-34*

**GRØNLAND, Qaqortoq**
**Marjun og Páll Poulsen**

Havi í seinastuni havt nógva pínu orsakað av skaðanum, eg fekk fyri góðum tveimum árum síðani. Biðið, at viðgerð hjálpir, og at eg varðveiti arbeiðsførleikan. Biðið fyri grønlendsku Heide, sum bleiv doypt í Ebenezer 13. apríl, at hon mennist andaliga, og at Harrin varðveitir hana. Um Gud vil, verður hon eitt álit á legunum í summar.

## *27. Týsdagur* *Áp. 4.1-20*

**SVEIS, Versoix, Redeemer Grace**
**Jeanette og Solomon Magura**
**Reuben 11, Micah 11**

Í Redeemer Grace leiðir Solomon samkomuna saman við tveimum

øðrum elstum. Teir flyta báðir av landinum í summar, og vit biðja Harran um at senda nýggj fólk í teirra stað at tæna her. Vit gleða okkum at vitja í Føroyum í juli.

## *28. Mikudagur* — *3. Mós. 17.1-16*



**FILIPSOYGGJAR, Nayba, NTM**
**Liz og Ragnar Niclasen**
Vit takka Gudi fyri árligu stevnuna hjá Kankanaey-samkomunum á páskum. Allir talarar vóru lokalir ella menn úr ættarbólkinum. Tveir trúboðarar vóru við. Hatta er gleðilig framgongd. Eg skal hjálpa í eini samkomu tveir tímar norðan fyri, tí ein av leiðandi monnunum andaðist. Endamálið er at hjálpa øðrum monnum at taka ábyrgd. Tað verða fýra tímar at koyra hvønn sunnudag. Vit eggja teimum trúgvandi at luttaka í arbeiðnum og royna tí at stuðla teimum sum best. Biðið, at hetta eydnast væl.

**FILIPSOYGGJAR, Naplud (f)**
**Monika og Tim Sharp**
**Hanna 17**

## *29. Hósdagur* — *Sálm. 48*

**JAPAN**
**Shino og Hallur Mortensen**
**Kano 15, Nana 13, Louie 11, Rio 6**
Vit hava eina enskt-kafé í samkomuni, og fleiri koma fast. Biðið, at enn fleiri koma, og at nøkur eisini koma til møtir, sum vit fara at hava á enskum.

**TEILAND, Chiang Mai**
**Corine og Sørin Joensen**
**Aron 13, Noah Kristian 11**

Biðið, at einstaklingarnar og familjurnar, ið vit hjálpa, kenna grøðing, vón og broyting. Vit hugsa serliga um tey, sum eru í kreppu ella føla seg avbyrgdan.

## *30. Fríggjadagur* *Áp. 4.21-37*

**USA, Nebraska, Ethnos 360**
**Rachel og Peter Hansen**

28. okt. - 2. nov. vitjar Peter á North Cotes fyri at lýsa tørvin ymiskum londum. 3.-11. nov. verða vit bæði í Rumenia til NTM leiðarafundir. 12.-25. nov. verða vit í Senegal til leiðarafundir og eitt forum. Biðið, at vit eru til signing í tænastuni.

**INDONESIA**
**Krissy og Daniel Hansen**
**Zephaniah 4, Selah Rose 2**

Tað gongur væl við arbeiðnum á visumskrivstovuni her á Papua. Biðið, at Gud vísir okkum, hvørja tænastu Hann hevur til okkara.


Útgevari KBS (Kristniboðssambandið)
Blaðnevnd Róland í Skorini, ábyrgd, Ernst Olsen, Elsa í Skorini, Randi Østerø, Dóra D. Gaard, Kristianna J. Heinesen, Óli Jákup Jacobsen, Jónvør Christiansen, Durita Olsen, Barbara og Ragnar Vest og Sigurð Ó. Vang.
Avgreiðsla Óla Hendrik av Fløtum, tel. 227057
Uppseting Grafikmaster, tel. 502022
Myndasavn info@grafikmaster.fo
Prent Føroyaprent, tel. 314555
Teldupostur prayerservicefo@gmail.com
Heimasíða www.kbs.fo

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
SVANAMERKTUR PRENTLUTUR 541 705


©KBS. Loyvt er at endurgeva tilfarið, um keldan verður nevnd.

## 31. Leygardagur — 3. Mós. 18.1-30

**THE VERITAS FORUM**
**www.veritas.org**

**BÓKATÆNASTAN**
Biðið fyri bókatænastuni hjá Leirkerinum og Logos Hope!

**NÝGGJ BÓK!**
**40 síður 130 kr.**

Henda spennandi søgan lærir um bøn, um trúfesti Dániels móti Gudi og um Guds trúfesti móti Dániel. Vit síggja, hvussu Gud veruliga er kongur yvir øllum og er við okkum allastaðni. Men hyggja vit nærri, so síggja vit eisini, hvussu søgur í Gamla Testamenti vísa til Jesus.
Arni Zachariassen týddi.




FORLAGIÐ LEIRKERIÐ

Bílegging á www.leirkerid.fo
Kráargøta 36 • Klaksvík
Tel. 718191 • leirkerid@leirkerid.fo